# Norðurlendskur kórfagnaður

**Í kvøld og í annaðkvøld, verður norðurlendskur kórfagnaður í Keypmannahavn. Á kórfagnaðinum verða tvær konsertir. Tann fyrra verður í kvøld á Norðurbryggjuni, og í annaðkvøld verður veitslukonsert í Vor Frelsers Kirke**

TÍÐINDASKRIV

Síðani 1997 hevur NAKF savnað íslendsk, grønlendsk og føroysk kór í Danmark fyri at framføra norðurlendskan tónleik.

Á konsertini, sum verður á Norðurbryggjuni í kvøld, fara kórini hvør sær at framføra verk úr egnari skrá. Gallakonsertin í annaðkvøld verður í Vor Frelsers Kirke í Christianshavn, har kórini saman framføra tað, tey hava vant á fagnaðinum.

Høvuðsverkið í ár er sjálvsagt verkið, sum er bílagt til júst henda fagnaðin. Tað er verkið, Effigiem Christi, sum Hugi Guðmundsson hevur skrivað.

Sámal Matras Kristiansen úr Fuglafirði fer at frumframføra, "Nú líðir móti summartíð", sum hann sjálvur hevur skrivað og lagt lag til.

Kórleiðararnir til hesar kórfagnaðir eru altíð norðurlendskir. Hesaferð verða tað, íslendarin Bernharður Wilkinson úr Íslandi og Mads Lumholt úr Grønlandi, sum fara at leiða kórsangin.

Konsertin í kvøld verður á Norðurbryggjuni klokkan 18.30.

Veitslukonsertin verður í Vor Frelsers Kirke í morgin klokkan 17.00.

Meira fæst at vita á heimasíðuni, www.nakf.dk


## HVØNN VEG SKAL EG FARA?

**Byrja yrkisleiðina í Sparikassanum**



Næmingar í Føroya Sparikassa fáa ein avbera góðan møguleika at skapa sær eina yrkisleið við góðum framtíðarmøguleikum. Júst nú sóknast Sparikassin eftir næmingum. Næmingarnir, vit nú leita eftir, skulu arbeiða í Suðurstreymi og Eysturoy.

Sum næmingur í Sparikassanum fært tú eina fjølbroytta og áhugaverda útbúgving innan peningastovns- og viðskiftatænastu. Tú fært kunnleika til at veita bæði privatum og virkjum fíggjarligar tænastur og ráðgeving í einum hátøkniligum umhvørvi.

Vit sóknast eftir einum lívligum og óhátíðarligum persóni, sum er ein eldhugaður bólkaspælari við kensluni av, at sjálvsábyrgd og góð tillagingarevni skapa íblástur.

Í okkara arbeiðsumhvørvi er týðandi, at bæði starvsfólk og kundar trívast og mennast. Vit leggja eisini dent á opið og ærligt prátingarlag, ið mennir ein felags hugburð millum starvsfólk og kundar.

Við útbúgving úr Føroya Sparikassa fært tú eisini førleika at starvast innan aðrar vinnur. Ella tú brúkar útbúgvingina sum lopfjøl til víðari útbúgving. Tó stremba vit sjálvandi eftir, at tú framhaldandi vilt vera á okkara liði, tí arbeiðið er mennandi og avbjóðandi. Sparikassin hevur eisini fleiri góð tilboð um víðari útbúgving innan fíggjarøkið.

Í næmingatíðini ert tú við í prógvgevandi lærugreinum, samstundis sum tú gongur í peningastovnsskúla. Næmingatíðin er 2 ár.

Umsøkjarar skulu hava lokið HH-, students-, HF- ella tilsvarandi prógv. Eisini næmingar, ið taka prógv í summar, eru vælkomnir at søkja.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Marjuna Eystberg, starvsfólkaleiðara, tel 348510 ella á telduposti marjun.eystberg@sparikassin.fo.

Send umsókn við avriti av próvskjølum til adressuna niðanfyri, so hon er okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 24. mai 2004.

Føroya Sparikassi
att.: Starvsfólkaleiðarin
Postsmoga 34
FO-110 Tórshavn

FØROYA SPARIKASSI



J. Broncks gøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo

WWW.SMYRIL-LINE.COM




**Á Vikuskiftisferðini** til Danmarkar 28. – 31. mai verður skipað fyri forkunnigum Country-festivali umborð á Norrönu, har Fimmbogi Lisberg og Pauli Jacobsen skipa fyri.



So er tað nú, at tit country-nostalgikarar eiga at rakna við og leggja tykkum á telefonina. Frá 28. – 31. mai fara vælsvingandi country-slagarar at runga umborð á Norrönu og kendir luttakarar úr inn- og útlandi, fara at tryggja tykkum eina væleydnaða og ógloymandi country-ferð.

Á heimferðini úr Hanstholm luttaka donsku Country-bólkarnir Vest & Blus úr Esbjerg og Hjørring-Hirtshals Country Show Dance.

Millum framførslurnar fer kendi country-guru'in Petur Rouch at leggja plátur á – við øðrum orðum: undirhald uttan íhald.

**COUNTRY-CRUISE**

**Prísirnir eru hesir:**

| | |
|---|---|
| Couchettir | 800,- |
| 4 koyggjukamar v. wc/bað innv. | 900,- |
| 4 koyggjukamar v. wc/bað útv. | 1.000,- |
| 3 koyggjukamar v. wc/bað innv. | 1.200,- |
| 3 koyggjukamar v. wc/bað útv. | 1.400,- |
| 2 koyggjukamar v. wc/bað útv. | 1.700,- |

Prísurin fatar um ferð fram og aftur á farleiðini Tórshavn-Hanstholm (matur og drykkjuvørur ikki íroknað).

**Luttakarar eru:**
- Jens Lisberg
- Ragnar í Vík
- Rúni Lisberg
- Ólavur Højgaard
- Erling Berg
- Petur Rouch
- Vest & Blus úr Esbjerg
- Hjørring-Hirtshals Country Show Dance

**TILTØK UMBORÐ**
- Undirvíst verður í Country-Dansi á heimferðini
- Umborð verður søla av lutum, ið hoyra heima í Country & Western høpi.

SMYRIL LINE




# Blás í hornið

**Árliga musikkstevnan, har hornorkestrini í landinum hittast, verður hildin í Vestmanna um vikuskiftið**

MUSIKKSTEVNA
*Edvard Joensen*

Hornorkestrini í landinum stevna til Vestmanna um vikuskiftið. Árliga musikkstevnan, sum síðan 1966 hevur verið hildin dýra biðidag, verður í ár í Vestmanna. Men hesaferð verður hon hildin í tveir dagar.

Í ár fer musikkstevnan at byrja við skeiði dýra biðidag og halda fram við konsertum leygardagin. Tað verða ein norðmaður og ein breti, sum fara at halda skeið fyri føroyskum hornblásarum i tí tyngra endanum dýrabiðidag.

Atli Petersen, leiðari hjá Vestmanna Hornorkestri, ið skipar fyri musikkstevnuni í ár, sigur, at tað eru norðmaðurin Erik Gjerdevik, sum fer at undirvísa føroyskum tubablásarum saman við bretanum David Childs, sum fer at undirvísa euphonium og baritone spælarum. Verkskeiðini enda við konsert fríggjakvøldið. Konsertin verður hildin í Vestmanna skúla klokkan 19.00, har teir báðir undirvísararnir verða solistar. Eisini fer felagsorkestrið hjá Vestmanna Hornorkestri og Sørvágs Tónleikarafelag at luttaka á konsertini saman við Martini Pollard, pianisti, og Føroya klarinettorkestri.

Vanliga musikkstevnukonsertin verður í ítróttarhøllini leygardagin 8. mai klokkan 14.00. Gunn Joensen, borgarstjóri í Vestmanna, fer at seta musikkstevnuna 2004

Orkestrini sum verða við í ár verða Vestmanna Hornorkestur, Sørvágs Tónleikafelag, Tvøroyrar Hornorkestur, Nes Sóknar Musikkfelag, Fuglafjarðar Hornorkestur, Klakksvíkar Hornorkestur, Havnar Ungdómshornorkestur, Havnar Hornorkestur og Harmoniorkestrið G.H.M, sigur Atli Petersen.

Í ár eru føroyingar í teirri støðu, at vit eiga ein europameistara í hornblástri. Tað er Havnar Hornorkestur, sum fyri eini viku síðan vann sær tann stóra heiðurin í kapping í Skotlandi.

Havnar Hornorkestur fær sum eitt slag av viðurkenning nøkur smávegis serrættindi á musikkstevnuni í ár. Nevniliga, at orkestrið sleppur at vera eitt sindur longri á pallinum, enn hini orkestrini, soleiðis at áhoyrarnir fáa møguleika at hoyra meginpartin av skránni, Havnar Hornorkestur vann europeisku kappingin í Skotlandi við, sigur Atli Petersen.

Fríggjadagin og leygardagin er eisini ein framsýning við instrumentum í skúlanum í Vestmanna. Tað eru fyritøkurnar Yamaha og The Music Group, sum hornblásarar betur kenna undir gamla navninum Boosey & Hawkes, sum fara at sýna fram instrument, tey hava at bjóða.




*Árliga musikkstevnan verður í ár í Vestmanna. Níggju hornorkestur fara at luttaka*







**Forkela mammu ókeypis við einum fínum døgurða í Glasstovuni - saman við familjuni.**

Mammudagin kl. 12.00 - 22.00 bjóðar Glasstovan eina matskrá við 3. rættum. Prísur kr. 200,- fyri hvønn yvir 12 ár - mamman ókeypis.

Børnini fáa pitsa, kips og ís.
Prísur kr. 60,- fyri hvønn.

Bíleggið borð á 317500.

Vit skapa góð minni...

★★★★
GLASSTOVAN
*The Favourite Restaurant*



**Einastandandi mai-tilboð frá Televarpinum!**

Frá 1. - 31. mai
**Televarpsmóttakari**
fyri einans



995,-*
spar 700,-

*Tilboðið er treytað av 12 mðr. Televarpshaldi

vanl. prísur 1.695,-




**Veitst tú at:**
- tilboðið gevur tær ***ókeypis*** Televarp í mai 2004
- tú fært ***bíligastu*** kortleiguna
- tú fært digitalt signal, sum gevur tær ***bestu góðskuna***
- við Televarpinum er tað ***lætt*** at stovna og broyta hald

**28 fjølbroyttar rásir til alla familjuna**
m.a. TV3, 3+ og Viasat Sport

**Hygg inn og fá eitt rás- og prísyvirlit við heim**




**Televarpið**
**tel 340340**
**televarp@televarp.fo**